# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Janus Kamban farin

Við Janusi Kamban er eitt tíðarhvarv, ein epoka, endað. Við deyða Janus Kambans er tann seinasti av einum framúrskarandi ættarliði av føroyskum listafólkum farin um sýn. Janus hoyrdi til tað fyrsta ættarliðið av yrkislærdum føroyskum listafólkum. Mikines, Elinborg Lützen og Janus Kamban vóru millum tey fyrstu, ið fóru av landinum at nema sær listarliga útbúgving á Kongaliga danska lista-akademinum. Janus vildi frá ungum árum gerast listamaður og varð í hesum ynski sínum stuðlaðar væl av sínum foreldrum og sínum heimliga umhvørvi. Hann fór ungur til Danmarkar og í 1932 varð hann tikin inn á Listakademiið, har hann hevði navnframar lærarar.

Janus Kamban gjørdist undangongumaður at menna og fremja føroyska list og at stuðla yrkisligu myndlistini. Hann var við til at stovna Listafelagið í 1941 og millum fremstu stuðlar, tá Listaskálin, seinni Listasavnið, varð sett á stovn. Janus hevði framúr listaligar gávur og eftir hann eru standmyndir og grafisk verk á hægsta listarliga støði. Hann var, sum rámandi verður tikið til í minningarorðum frá Listasanvinum, ein av teimum slóðarum, sum við margfeldi sínum góvu teirra íkast til, at tað kyknaði upp eitt medvit um virði av myndlisitni og týdningi hennara fyri tann føroyska listarliga samleikan. Grafisku verk Janusar hava eitt tíðarleyst einfeldi, sum enn í dag eru fyrimyndarlig. "Stramma" skapið á høggmyndini lyftir gerandismyndevnið upp í ein annan heim. Við kærleika og við eyga fyri vakurleikanum í gerandisdegnum og virksemi hjá vanligum menniskjum hevjar hann hesi evni til stóra list. Vit loyva okkum at gera hesi orð til okkara og mongu munnu vera samd í, at við Janusi er ein av okkara mætastu mentamonnum farin í søguna.

Janus var vegarin og stuðulin hjá ungum listafólkum. Hann var samstundis tann einstaklingur í síni tíð, ið best dugdi at fáa áskoðaran, almenningin at fata týdningin av góðari list. Hansara serstaki hugburður, hansara humor og hansara krøv til listina og listafólkið hava havt stóran týdning fyri menningina av føroyskari list og fyri virðingina fyri skapandi listafólkum. Motivini eru oftast úr gerandislívinum, sum við listarligu evnum Janusar vórðu lyft upp á eitt hægri støði – hann lærdi okkum at síggja tað vakra í tí einfalda og gerandisliga.

Janus Kamban var alt sítt vaksna lív politiskt áhugaður og sum ungur nýtti hann blað okkara sum málgagn, har hann í felag við øðrum føroyskum intellektuellum gjørdi beinraknar viðmerkingar til samfelagsligar skeivleikar og órættvísi. Hann var hugdjarvur og fylgdi væl við og varðveitti til tað síðsta sína grundleggjandi heimsáskoðan og fylgdi væl við í heimligum eins væl og alheimsligsligum vandamálum. Janus var komin til høgan aldur og kundi við góðari samvitsku leggja frá sær. Eftir hann verður ikki eldsløkkingur, tí hann hevur meira enn nakar annar birt upp undir listarliga virksemið í Føroyum og eigur hann sín part av æruni fyri, at myndlist í Føroyum støðugt mennist og blómar.

**Sosialurin**

## Stýrið fyri Atlantis lagt frá sær

**Opið bræv til Klaksvíkar Kommunu**
**Att: Gunnvá við Keldu, borgarstjóri**
**700 Klaksvík**
**Klaksvík 30.04.2009**

Undirritaðu stýrislimir fyri Grunnin Mentanarhúsið Atlantis hava í dag á fundi tikið avgerð um at siga okkum frá sum stýrislimir frá 1. mai 2009 at rokna.

Henda avgerð er tikin, eftir at býráðið á fundi hin 29. apríl 2009 gjørdi av at skerja játtanina til grunnin í inniverandi ári við kr. 100.000,-.

Stýrið hevur í samband við viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2009 gjørt vart við, at ikki bar til at skerja játtanina til Atlantis við meira enn kr. 50.000,-. Hetta bleiv eisini gjørt, tá játtanin fyri 2009 varð minkað við kr. 50.000,-.

Avgerðin hjá býráðnum, um nú aftur at minka játtanina við kr. 100.000 í samband við endurskoðaðu fíggjarætlanina hjá Klaksvíkar Kommunu, hevur við sær, at stýrislimirnir staðfesta, at tað ikki er møguligt at hava ein framhaldandi rakstur av stovninum.

Tá Klaksvíkar Kommuna hevur eina aðra fatan av støðuni enn undirritaðu stýrislimir, so lata vit tað upp í hendurnar á kommununi sjálvari at gjøgnumføra sínar ætlanir.

**Nikolina Olsen, forkvinna**
**Súsanna Olsen**
**Fróði Løkságarð**

## Til allar tingmenn

**MANBJØRN Í GRUND**

Um ein lesur føroysku sjólógina sæst, at ein og hvør, sum hevur altjóða viðurkenda útbúgving, kann vera skipari á føroyskum skipum.

Danir siga at eitt danskt skip er ein partur av Danmark, hvar tað so er í verðini. Tí krevja teir, at skiparin hevur danskan heimarætt. (ES?)

Men síggja vit eitt skip við føroyskum flaggi, so kann skiparin fyri tað vera av blálondum.

Einaferð var rópt um at útlendingar ovfiskaðu –grópaðu- grunnar okkara. Tá vórðu teir riknir av grunnunum.

So bleiv loyvt at ognarrætturin til føroysku skipini var útlendskur.

**Nú er hægsti myndugleiki um borð latin til útlendingar .**

Spurningur: 1) Nær er hettar hent? 2) Hví? 3) Hvussu ber tað til at føroyingar flestir

## Um seyðin av/á vegnum. Meðan vit bíða eftir hegni

**JONNA JUSTINUSSEN**

Tað verður spennandi at vita, hvussu tað fer at eydnast tykkum, ið krevja seyðin av vegnum at koma á mál. Serliga gleði eg meg til, at tað verður trygt hjá smálombunum. At hugsa sær, at nakar, ið eigur smálomb kann sova róliga, vitandi at lombini renna úti á vegnum. Ein morgunin í fjør kundi eg rakt eini fýra fimm smálomb ísenn, tey lupu yvir um vegin, men vendu so við aftur. Til alla lukku hevði eg tikið ferðina av bilinum, hevði slept speedara¬num, tí eg nærkaðist seyði.

Tað verður altíð tosað um at byrgja seyðin inni, men hvat tá onkur ær er komin útum? Við Kalbakstunnilin liggur alt ov ofta ein yvirkoyrd ær, og har er bæði hegn og bilverja.

Smálombini, ið fara út ígjøgnum meskarnar? Har kundi man havt tættari hegn, so var tann trupulleikin loystur. Yvirkoyrd smálomb er ikki til at bera, og eg frøist als ikki yvir hesa tíðina við smálombum. Tvørturímóti.

Okkurt má gerast beinanvegin, tað er ov leingi at bíða til allir vegir eru hegnaðir inni. Hvat skulu vit gera fyri at fáa djór at halda seg burtur frá vegnum? Hvat við at hugsa kreativt og gera eina hugskotskapping og fingið gjørt okkurt smávegis beinanvegin?

Onkustaðni havi eg sæð, at Landsverk hevur eina maskinu, ið grópar tað bleyta fram við asfaltinum upp, og koyrir grovan skerv á í staðin. Tað kann gerast beinanvegin og hjálpir eitt lítið sindur, tí tað hevði tikið grasið fram við asfaltinum burtur. Hetta saman við klóripinnum í haganum, ið staðin fyri teimum, ið standa fram við vegnum, og kanska salttinnur eisini, hevði tikið orsøkina hjá seyði yvirhøvur at uppihalda seg við vegkantin burtur. Kanska latið seyðahundin runnið sær ein túr fram við vegnum, havt eina smala gøtu nærhendis, so alt vegaøkið kendist ótrygt.

At siga at 3% av íbúgvunum í Føroyum vil hava seyðin av vegnum er ikki rætt. Talið er nærri 100%, og seyður á vegnum er eitt evni, vit ikki verða liðug við, fyrr enn ongin seyður er eftir.

Tá tað er eydnast at fáa seyðin av vegnum, koma vit til gæs, harur, tjøldur og likkur. Fyribils er bert eitt at gera, nevniliga at seta ferðina niður, tá tú nærkast djórum. Likkur og tjøldur hava ringt við at "fóta sær" í nógvum vindi, har mugu vit menniskju geva teimum gætur.

Tað nýggja er ofta tað gamla sum er vent á høvdið, og í hesum føri hevur seyður altíð gingið allastaðni. Tað umvenda er so, at hann hevur ávís øki at ganga á, og at tað nú er ábyrgdarleyst at lata standa til og sleppa honum út á vegin, har teir vandamiklu bilarnar koyra. Tað er antin/ella, bilar ella seyður.

Kanska fara vit í framtíðini bert at hava seyð á ávísum oyggjum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.